Stóri gekkavinnarin Jón Thune:

# – Visti eg fór at vinna

**Mamma leyp himmalhøgt úr sofuna, vinmenninir vóru á gosi, men eg var púra róligur. Eg kendi á mær fyrr á kvøldið, at eg fór at vinna, sigur hepni gekkavinnarin, Jón Thune**

VINNINGUR
*Liv Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið sótu um 15.000. føroyingar spentir framman fyri sjónvarpinum og spældu Gekk. Jón Thune úr Runavík sat heima í stovuni saman við trimum vinmonnum við tveimum gekkaheftum framman fyri sær. At hann løtu seinni gjørdist hepni vinnarin, av stóra bláa gekkinum á heili 260.000 kr, kom ikki óvart á hann.

– Eg kendi á mær, at eg fór at vinna. Mamma bað meg tískil fara oman á Statoil í Saltangará at keypa gekkahefti. Eg leyp oman og náddi tað so dánt.

Sum vera man hava nógv verið hjá Jóni og forvitnast seinastu dagarnar. Serliga hava nógv fregnast um, hvat hann ætlar sær at brúka pengarnar til:

– Eg fari at brúka hvørt oyra til eini nýggj hús. Tað ræður um at seta pengarnar eitt rætt stað. Eg hevði 39 SMS og 38 ósvaraðar uppringingar, tá eg legði hornið á eftir Gekkin. Fleiri hava eisini spurt, um tey kunnu fáa nøkur prosent av vinninginum, men alt fer eftir ætlan til nýggju húsini.

Úr Kringvarpinum verður sagt, at eingin hevur vunnið eins stóran gekkavinning síðan 1998. Tá var hann á 220.000. kr.




*– Hetta kennist gott. Nú fari eg í øllum førum at spæla Gekk hvørt fríggjakvøld, segði Jón Thune, tá hann júst hevði fingið stóra kekkin upp í hendurnar*







**GOSPELTÚRUR 04.05-08.05**

Sigið gerandisdegnum farvæl og roynið 3 frálíkar dagar umborð á Norrønu við gospeltónleiki ovast á skránni. Njótið stóru løturnar tá landsins fremstu gospelsangarar lata sangin ljóma yvir Atlantshavið. Roynið góða matin, køkuborðið og góðu tilboðini í tax-free handlinum. Ein upplagdur møguleiki at hugna sær saman við maka, familju og vinfólki.

**Prísur fyri hvønn úr bert kr. 870,-**

Prísurin er í 4 koyggjukamari við wc/bað innv. Eykakostnaður: Oljuavgjald kr. 120,- fyri hvønn ferðandi og avgreiðslugjald kr. 120,- fyri bíleggingina. Fráferð er 04.05.06.

**LUTTAKARAR:**

- Magni Christiansen
- Heine Lützen
- Proclaim
- Sigrið Rasmussen
- Ekklesia
- Sigrið Sivertsen
  Workshop – kórverkstaður
- Gyklarin Røgvi Dam

REPROZ



**Søkt verður eftir einum fólki til Smyril Blue Water**

SBW søkir eftir einum skrivstovufólki. Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Starvið fevnir um:**
Avgreiðslu av inngangandi farmi
Kundaavgreiðslu
Vanligt skrivstovuarbeiði
Trailarastýring
Estimering av útreiðslum

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst, at umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur at arbeiða við teldu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanaðarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært avtalu.

Umsóknir við møguligum prógvum skulu sendast til

Smyril Blue Water P/F
Att. Heðin Joensen
Postsmoga 3296
FO-110 Tórshavn
hedinj@sbwcargo.com

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. mars 2006

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen á tlf. 345962

*...Nordatlantens hurtigste fragtrute!*